# Fogh aftur í Føroyum

**Danski forsætisráðharrin kemur saman við grønlendska landstingsformannin um til Føroya á ríkisfund**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tað verður ikki hvør sum helst, sum kemur á vitjan í Leynum mánamorgunin. Tá verður tann árligi ríkisfundurin millum ovastarnar fyri tey trý londini í ríkisfelagsskapinum, Jóannes Eidesgaard, Hans Enoksen og Anders Fogh Rasmussen. Fundurin verður hildin í einum sethúsum í Leynum Fundurin plagar at vera stuttur, og fleiri yvirordnað mál verða vanliga umrødd. Fundurin er ein sokallaður óformellur fundur. Tað er sostatt eingin skrá fyri fundin. Tað er upp til teir tríggjar luttakararnar sjálvar at gera av, hvat teir hava hug at tosa um. Vanliga plagar kunning at vera mest nýtta orðið, tá greitt verður frá um innihaldið á fundinum.



*Anders Fogh Rasmussen kemur aftur á stutta vitjan til Føroya í sambandi við ein óformellan ríkisfund*

### Skrá

Skráin fyri vitjanina er hendan:
Sunnumorgunin kl. 10.00 koma gestirnir til landið. Á flogvøllinum tekur løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ímóti landstingsformanninum, Hans Enoksen, og forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, við fylgi.

Av flogvøllinum gongur leiðin til Sørvágs og haðani ein túr við bátinum Froyi. Millum annað verður siglt framvið Vestmannabjørgunum. Ferðin við báti endar í Saksun, og seint seinnapartin verður koyrt aftur til Havnar.

Sjálvur ríkisfundurin verður í Leynum mánadagin.

Hóast lagið óivað verður gott, so verður neyvan fult á Leynasandi. Men so langt eyga røkkur verða eisini embætisfólk í Leynum um hetta mundið. Tey hava boðað frá fundi á hægsta embætismannastigi.

– Hetta er ein afturvendandi fundur. Vit plaga at kunna hvønn annan um ymisk viðurskifti í teimum trimum londunum, sigur Sigmund Isfeldt, føroyskur embætismaður.

Fundurin hjá embætisfólkunum er eisini óformellur.

Seinni í mánaðinum kemur Føroya nevndin hjá danska Fólkatinginum á vitjan.

# Waiting for confirmation

**Føroysk børn skulu duga betri enskt, men einasti broytingin er, at undirvísingin byrjar í fjórða flokki. Ei heldur skulu vit rokna við fleiri flokkum á lærara-skúlanum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur almannakunngjørt eina tíðarætlan fyri einskiljingarnar, ið ætlanin er at fremja. Men tað er ikki bara sum at siga tað at fáa tíðarætlanir á øðrum økjum.

– Vit eru enn á byrjunarstøði, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.

Løgmaður legði hart út í tinginum á ólavsøku og gjørdi greitt, at nú skulu føroysk skúlabørn duga eins væl enskt sum danskt. Men júst hvussu hetta verður veruleiki er heldur torført at fáa eyga á í løtuni.

Avgerð er tikin um, at undirvísingin í enskum skal byrja í fjórða flokki frá næsta skúlaári at rokna. Men hetta verður so tann einasta broytingin, ið verður framd í fyrstu atløgu.

– Nú mugu vit fylgja við, hvussu tað fer at hilnast við hesari royndini. Vit hava ikki hildið tað vera ráðiligt at byrja enskt longu í triðja flokki, sigur Jógvan á Lakjuni.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hann heldur tað vera av alstórum týdningi, at føroysk skúlabørn duga væl tey norðurlendsku málini.

### Ikki fleiri lærarar

Tað verður sagt ferð eftir ferð í røðuni hjá løgmanni á ólavsøku, at útbúgving skal raðfestast hægst. Hvussu hetta verður gjørt er heldur ikki ítøkiliga greitt. Í øllum førum verður tað ikki gjørt við at útbúgva enn fleiri lærarar.

– Eg veit ikki, um tað er so øgiliga stórur tørvur á fleiri lærarum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Sum er tekur Føroya læraraskúli í flestu førum ein flokk inn um árið, men nógv hava víst á, at tað er tørvur á at taka fleiri



*Stinnari í enskum. Føroyskir skúlanæmingar byrja við enskum í fjórða flokki, men tað er higartil einasta stigi at bøta um førleikan í enskum hjá føroyskum skúlanæmingum*

flokkar inn, og umsóknirnar plaga at vera um hundrað á hvørjum ári.

Í løtuni verður arbeitt við einari ætlan um at umskipa læraraútbúgvingina til eina bachelor útbúgving, soleiðis at hon passar betri saman við øðrum útbúgvingum á lærdum háskúlum.

Tað er eingin kostnaðarmeting av, hvat visiónirnar hjá landsstýrinum fara at kosta skattgjaldarunum.

## Roknskapir fyri 2004

Tað byrjar av álvara at fyllast hjá Skráseting Føroya við roknskapum fyri 2004. Vit nevna her nakrar av teimum nýggjastu almennu roknskapunum frá 2004.

### Tjaldrið flýgur høgt

Á næstovastu rók fyri ársúrslitini hjá øllum føroyskum fyritøkum fyri 2004, finna vit P/F Tjaldur. Felagið átti áður Skipafelagið Føroyar, ið varð selt til Eimskip. Felagið hevði heilar seksti milliónir í yvirskoti fyri 2004. Áðrenn skattur fór av vóru heili áttati milliónir í yvirskoti. Undir teiginum óvanliga inntøkur í sambandi við flyting av virksemi eru 79 milliónir inntøkuførdar. Bert Føroya Banki við sínum 97 milliónum í yvirskoti kann vísa eitt betri flog enn Tjaldrið fyri 2004.

### Undirskot á bilasøluni

P/F Bilasølan, ið selir bilasløgini VW, Audi, Seat og Mazda, hevði eitt hall áljóðandi 428.000 krónur fyri 2004. Størsta broytingin í eksterna roknskapinum finna vit undir starvsfólkakostn-aður. Har eru útreiðslurnar voksnar góðar 550.000 krónur. Ì roknskapinum verður skrivað, at úrslitið verður ikki mett at vera nøktandi.

### Pakka seg til yvirskot

Ein av størru fyritøkunum í Vestmanna, Vest Pack, hevði 877.000 krónur í yvirskoti fyri – 702.000 krónur, tá skatturin var farin av. Tað er Havnar Timburhandil, sum eigur Vest Pack. Roknað verður við á leið sama úrsliti fyri 2005, men tó verður roknað við størri sølu til útfluttning.

### Rør selja væl

Ein onnur fyritøku, sum eisini kann frøast um eitt gott ár í fjør, er P/F Svend Krosstein. Yvirskoti var 11 milliónir áðrenn skatt, og 9,1 millión var eftir hjá felagnum, tá alt var farin av. Partaeigarnir, allir við eftirnavninum Krosstein, hava valt at rinda 600.000 krónur í vinningsbýti. Ùrslitið er ávirkað nógv av sølu av bygningi.